## Bilurin hjá Peter: Audi Q7



## Sethús

Upprunaligt byggiár: 1989. Keyptu tey í 2005

# a Sjóvinnubankanum
# Kaupthing

## Samrøða



**Heri Simonsen**
heri@sosialurin.fo

Mamman Ingibjørg er úr Fuglafirði, og pápin Jens er úr Danmark. Men Peter Holm, og 2 ára yngri bróðurin; Jan Otto Holm, sum eisini starvast hjá Kaupthing traðkaðu sínar barnaskógvar í Syðrugøtu. Bygdin, sum næstan er blivin hvørsmans ogn, meðan G-Festivalurin er, var barndómsins óspilti heimur hjá Peter. Góðu barnaárini gingu skjótt, har spælið niðri við sandin og í fjøruni høvdu sín natúrliga lut hjá bygdardronginum. GÍ fylti eisini nógv barna- og ungdómsárini. Fyri ein smádrong var tað ein langur spákitúrur at ganga úr Syðrugøtu, og til Norðragøtu fyri at kunna sleppa at spæla bólt í Sarpugerði. Men hetta var ein sjálvsagdur lutur hjá Peter, sum tað hevur verið hjá so mongum ungum og børnum í Gøtunum. Peter stóð nógv í málinum hjá GÍ, kappingarárið 1985, og eisini seinni í áttatiárunum. Men tá GÍ vann FM-heitið í 1986 spældi Peter á besta liðnum hjá hálvu bygdarmonnunum í Fuglafirði. Fuglafjørður var eisini eitt av barndómsins paradísum hjá Peter og Jan Otto. Peter hevur serliga góð minnir frá abbanum; Otto Eliassen. Hann og Jan Otto ferðaðust mangan inni í Fuglafirði, sum smádreingir. Tað skuldi tó eydnast Peturi at vinna eitt FM-heitið við ÍF í 1989. Men tað var ikki í fótbólti, men í flogbólti har ÍF hevur gjørt meiri um seg.

### Samanhaldið við Gøtugjógv

Petur fór í 1. flokk í 1975, og gekk hann 1. til 7. flokk í fólkaskúlanum við Gøtugjógv. 8. og 9. flokk tók hann á felags framhaldsdeildini í Fuglafirði. Í 1984 fór Peter í 1.g í Studentaskúlan, sum tá lá við Gøtugjógv. Tey vóru triðji studentaárgangurin, sum gekk í Studentaskúlanum við Gøtugjógv. Umstøðurnar vóru trongar, og merktar av, at skúlin var eitt tátíðar pilotprojekt. Albogarúmið var ikki stórt, men tað var hjartarúmið harafturímóti. Tey sum gingu á Studentaskúlanum við Gøtugjógv høvdu eitt serligt samanhald. "Eg taki synd í teimum, sum ganga í Kambsdali í dag. Víst hava tey betri umstøður og fasilitetir. Men tey eru ikki í námind av tí felagsanda og samanhaldi, sum vit høvdu, sum gingu við Gøtugjógv." sigur Petur sælur av góðum ungdómsminnum.

### Yrkisleiðin ikki heilt greið

Yrkisleiðin hjá Peter lá ikki heilt greið meðan hann gekk á Studentaskúlanum. Hann lá og vigaði millum søgu, datalogi og verkfrøði. Hann hevði stóran áhuga fyri øllum trimum. Tó valdi hann at fara í læru í gamla Sjóvinnubankanum. "Læt meg líka royna hetta her" var tankin tá hann fór í læru í 1987. Peter minnist, at gamli lokali stjórin í Sjóvinnubankanum í Fuglafirði, var millum teir, sum grunaðu hvat kundi fara at henda við føroyska búskapinum. "Hetta gongur einaferð galið" plagdi Ditlev Róin at taka til. Og í 1992 gjørdist illgrunin til veruleika. Peter fekst nógv við EDB-tøkni meðan hann var í Sjóvinnubankanum, og hetta beindi hann á útbúgvingina HA-DAT, ella eisini nevnd: DØK, sum er ein stytting fyri "Datalogi og økonomi". Peter tók prógv sum DØK'ari í 1992. Hesi árini gjørdist yrkisleiðin greið fyri Peter. Honum fór at dáma at lesa finansiering og roknskap. Árini 1992-1995 var hann tað ein nevnir: lánsbrævagreinari á Bikuben Børs í Keypmannahavn. Hesi árini var hann bæði í fulltíðar starvi, umframt at lesa.

## Fakta

Navn: Peter Holm
Føðingardagur: 4. november 1968
Bústaður: Millum Gilja 2 í Hoyvík
Hjúnarstøða: Giftur Fridu (fødd Andreasen) av Toftum
Børn: 3 børn tilsamans
Starv: Stjóri í Kaupthing Bank
Útbúgvingar: Matematiskur Studentur frá Gøtugjógv í 1987, útlærdur í gamla Sjóvinnubankanum í 1989, HA/DAT ella DØK (Datalogi og økonomi), prógv í 1992, Cand. Merc-FIR (Finansiering og regnskab), prógv í 1995.



*Petur heldur, at føroyskir politikarar seta onnur í gongd í visjónsbólkum, uttan at gera nakað nevnivert sjálvir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*